
*Sanna verdóttir Jógvan Joensen, saman við dótrini Theu. Sjálv misti Sanna ein son, sum datt oman*

Mamma mátti so taka við ábyrgdini, sum pápi annars hevði havt. Abbi doyði árið eftir. Mamma mátti tá eisini hugsa um at fáa hann í jørðina. Hon átti altíð eitt stykki av hvítum toy til at taka til sum líkverju. Hetta plagdu fólk yvirhøvur at liggja inni við.

So var tað at fáa viðin til kistu, og tað mátti mamma so eisini syrgja fyri. Kistur vóru smíðaðar í oynni. Mamma mátti eisini fáa onkran at hjálpa sær við at smíða eina kistu.

Afturat hesum kom, at omma bleiv í ørviti aftaná skaðadagin. Øllum hon møtti í bygdini eftir hetta spurdi hon: "Hava tit sæð teir? Hava tit hoyrt nakað frá teimum?"

Men skjótt legðist hon í seingina og gjørdist røktarsjúklingur við øllum tí stríði hetta hevði við sær.

Omma lá nøkur ár í seingini á hendan hátt. Eg havi vist verið út móti skúlaaldri, tá ið hon doyði. Tað hevur tí verið so tungt hjá mammu at fara gjøgnum hetta umframt missin av manninum.

Mamma segði altíð, at tað var gott, at hon átti eini deilig hús, sum vóru skuldarfrí. Hon fekk onga fíggjarliga hjálp av nøkrum slag. Trygging var eingin, og hon slapp ikki so mikið sum undan at rinda jarðarskatt fyri tað sindri av jørð, sum var í húsinum.

Pápi var 43 ár, tá ið hann doyði, og mamma var nakað yngri. Mamma varð stundum spurd, um hon ikki fór til Havnar at búgva. Har kundi tað kanska verið læŧtari at klára seg. "Men hvat skuldi eg gera í Havn?" Nei, hon skuldi ongan veg.

## Konufólkið kastaði nót

Hestur var eitt gott seiðapláss Tá ið tey kastaðu nót, vóru konufólkini altíð uppi í á landi at draga nótina. Og vit børn um skúlaaldur, vit hjálptu eisini til uppá okkara máta og fingu seiðin niðan frá.

Vit høvdu eitt so gott og stórt loft. Táið nótin hevði verið brúkt, varð hon vaskað og turkað. Hon varð hongd á stakittir rundan um kirkjuna. Tá hon var turr, varð hon borin út á loftið hjá okkum uppi undir vaðingina. Loftið var stórt, og har var bert eitt kamar. Vit fingu ein nótapart fyri at goyma nótina. Tað var eitt kvett. Mamma dugdi so væl at fáa burtur úr. Hon gjørdi knettir og frikadellur, so leingi tað bar til, og seiðurin var nóg feskur. Seiður var eisini hongdur upp ella saltaður. Mamma flakti eisini seiðin, og hann var saltaður. Livurin var eisini brúkt. Seiðurin kundi vera kókaður í livur ella eisini steiktur í livur. Áðrenn mína tíð bræddu tey eisini livur í Hesti.

Mamma dugdi eisini so væl við mati. Hon hevði eisini verið burtur, tá ið hon var ung, og hon hevði tænt í Havn.

Millum húsini, har hon tænti var hjá Amaliu og Grønlands Johan. Hetta var í hvussu er eitt av teimum "fínu" húsunum í Havn. Johan hevði verið kolonibestýrari í Grønlandi. Hon var dóttir gamla sýslumannin Müller, og hon hevði privatskúla í nógv ár, eftir at tey vóru komin heim aftur.

Eisini hevði mamma tænt hjá Conrad Nicolajsen, kendur sum postførari, og sum tann, ið legði navn til Konradsbrekku, núverandi Grím Kambansgøtu.

Mamma hevði altíð góðan mat. Nakrar hønur hevði hon eisini, so tað fekst altíð eitt sindur av eggum.

Hon steikti eisini grindabúffar, sum tað kallast í dag. Tað var ikki vanligt tá.

Tá so grind var, fingu vit grindapartar. Tað kundi vera, tá grind var í Havn ella í Vágum. Matthias Thomsen, sum var slektaður úr Vágunum og gifti seg til garð í Hesti var grindaformaður. Tá ið grind var í Sandoy, vóru hestmenn sjálvandi við. Tá áttu fólk í Hesti eisini heimapart.

Mamma dugdi eisini so sera væl til hendurnar. Hon kundi seyma, og hon kundi veva. Var onkur, sum bað hana um at veva sær til einar buksur ella at seyma sær ein skjúrtu, so gjørdi hon tað. Mamma bant og spann eisini.

## Torv

Nógv gekk út uppá gerðabýti. Onnur gjørdu okkum beinar afturfyri tað, sum vit gjørdu fyri tey. Tað var tað sama, tá torv skuldi skerast. Onkur bjóðaði sær til at skera torv hjá okkum. So gjørdi mamma okkurt fyri tey afturfyri sum at seyma. Onkur velti okkum eina lítla veltu, so vit høvdu nokk av eplum. Men alt hetta máttu hon skipa fyri einsamøll.

Eg havi ofta hugsað um tað. Vit sum børn høvdu tað gott, men hjá mammu at vera forsyrgjari var strævið.

Ongantíð minnist eg hana klaga. Eg minnist, at eg plagdi at hoyra hana fara upp um morgnarnar. Hon skavaðist í køkinum at kyka og slíkt.

Torvið var heilt uppi á oynni. Hvørt hús hevði sínar torvheiðar. Sjálv mátti mamma bera torvið til hús.

Eg kann minnast sum barn, at hon fór nokk so tíðliga um morgnarnar niðan á oynna, áðrenn tað var blivið ordiliga ljóst. Eg minnist eisini, tá eg havi verið eini fimm ár og systir mín sjey ár, at hon beindi svávulpinnar og knívar burtur og bant vindeyguni, hvørja ferð hon fór avstað.

Vit gjørdu vist einki býtt, men hetta gjørdi hon fyri at vera púra sikkur. Serliga út móti heystinum kundi hon vera tríggjar ferðir um dagin uppi á oynni. Hvør túrur tók út ímóti trimum tímum. Tað kundi fara allur dagurin.

Millum torvferðirnar royndi hon at fáa ketilin kókaðan, og meðan hon bíðaði sat hon altíð og las í bíbliuni, og so sang hon fyri seg sjálvan. Hesar sangir dugdi eg uttanat, tá ið eg varð konfirmerað.

Tey vóru so føst í Harranum. Tað var tann troystin tey høvdu.

Tá mamma var í torvi vóru vit vanliga saman við øðrum børnum. Hon setti okkum altíð ein bita, so vit kundu fáa okkum, meðan hon var burtur.

Ein uppgáva hjá mammu var eisini at skiftast við hini bygdafólkini um at leggja torv í ovnin í skúlanum og leggja so nógv torv har, at tað var heitt fyri dagin.

Eisini skuldi skúlin vaskast tríggjar dagar um vikuna, og tað var á sama hátt.

Tað vóru eini 25 hús í Hesti.

Tað var ein sovorðin missur í Hesti tá, tað var øgiligt. Tó rýmdi eingin úr Hesti, men nú umstøðurnar eru so góðar, nú rýma øll.


*Hestbygd misti 16 menn á sjónum frá 1911-1919*


*Minnisvarðin í Hesti*


*Álvagjógv í Hesti*

## Dreymar

Som ofta er við slíkum vanlukkum, varð eisini her sagt frá nógvum dreymum, sum kundu fatast sum eitt varsil.

Oddmar, sonur tann umrødda Hans Poulsen, greiðir serliga frá einum dreymi, sum nógv var tosað um.

Ein dagin fólk var savnað inni í skómakaraverkstaðnum hjá Hans Jacob Niclasen, kemur Esmar inn.

Hann fortaldi frá einum dreymi, hann hevði havt. Hann hevði sæð ein mann uppi á Snið, sum er gøtan niðan á oynna. Hann hevði sagt nakað soleiðis: "Tað skal ikki vera leingi til tað, sum vendir upp á Hestoynni, skal venda niður."

Tann fyrri báturin sum gekk burtur, kallaðist júst Hestoyggin. Bátsformaðurin Hans í Sakrastovu gjørdist líkbleikur, og slapp sær út.

Tað var heldur ikki hann, sum gav útróðrarboð feigdardagin. Tað vóru eisini frásagnir um dreymar aftaná skaðadagin. Mamma tosaði tó ongantíð um slíkt, so hetta havi eg ikki hoyrt.

**Komandi partur**
Í seinna partinum greiðir Ingibjørg millum annað frá fólkafundinum í Hesti í 1934

Sosialurin